TB-ÍF 3-0 (25-12, 25-14, 25-18)

# TB endaði árið við sigri

**TB vann lættan sigur á ÍF í nærum fullsettari høll í Trongisvági í seinasta landskappingardystin um í ár**

FLOGBÓLTUR – KVINNUR
*Sveinur Tróndarson*

TB gjørdi skjótt av í seinasta landskappingardystinum í ár. Dysturin, sum varð leiktur á heimavølli móti ÍF, byrjaði klokkan 15 og vardi minni enn ein tíma. Tá hevði TB tryggjað sær ein greiðan 3-0 sigur við settúrslitunum, sum standa omanfyri.

Munurin var, sum tølini geva greiðar ábendingar um, sera stórur. TB hevði eina greiða ætlan um, at hesin dysturin skuldi vinnast, og ta ætlanina hildu meistararnir seg til. Onga løtu fingu fuglfirðingar tíð til at skipa seg á vøllinum, og tí fingu tær ongantíð veruliga fótin fyri seg.

– Eg veit ikki um tað vóru teir nógvu áskoðararnir í høllini, sum gjørdu sítt, men tað kom ongantíð spenningur í dystin, sigur Virgar Djurhuus, venjari hjá TB.

Hann leggur afturat, at talan í roynd og veru var um einvegis ferðslu í dystinum, og at tað tí ongantíð var nakar ivi um, hvørt meistararnir fóru at vinna dystin ella ikki.

Hesum gevur Rønn Eliasen, liðskipari hjá ÍF, honum rætt í. Hon sigur, at teirra spæl ongantíð hekk saman, og at tað tí einki var at siga til, at TB vann ein so ruddiligan sigur.

– Hjá okkum riggaði einki. Vit kiksaðu alt ov nógvar servur og móttøkuspælið var heilt einfalt ikki nóg gott. Samstundis fluttu vit okkum alt ov lítið á vøllinum, og tí fekk TB alt ov lætt spæl, sigur Rønn Eliasen.

ÍF liðið hevði annars gjørt sítt til, at fyrireika seg til dystin so væl sum til ber. Tær vóru farnar suður leygarkvøldið fyri at vera til dystin fús sunnudagin, og tí er tað kanska eitt uppaftur størri vónbrot, at dysturin gekk so illa sum hann gjørdi.

Úrslitið av dystinum á Tvøroyri hevði við sær, at TB bara tapti tann eina dystin í hesum kappingarárinum. Tað var seinni dysturin móti Mjølnir í grundspælinum, men tað úrslitið fekk ongantíð nakra ávirkan á, hvør gjørdist Føroyameistari. Til tað var munurin á TB og hinum liðunum ov stórur.

Nýggju Føroyameistararnir hava nevniliga verið eina tonn betri enn øll hini liðini, og so hava tær afturat tí, havt tað hepni, sum skal til, tá tað leikliga ikki hevur hingið so væl saman. Men soleiðis gongur tað ofta hjá teimum góðu liðunum, sum hava styrkina til at uppsøkja hepni.

Tey, sum sóu steypafinaluna, vita, at talan veruliga er um eitt gott lið, sum hevur leikararnar, sum kunnu avgera dystirnar, hvør í sínum lagi.

Munurin í ár var kanska í so stórur, og ein av orsøkunum kann vera, at hini liðini hava havt ov stóra virðing fyri TB. Ikki tí, at tær ikki hava tað uppiborið, men veruleikin er, at tær í fleiri umførum eru slopnar ov lætt. Hevði mótstøðuliðið tá dugað at sett ferðina upp, kundi verið, at trýstið á TB-liðið hevði havt við sær størri ótryggleika millum leikararnar.

Soleiðis verður ikki í ár, tí TB hevur nú leikt seinasta dystin og tær kunnu – av røttum – kalla seg Føroyameistarar. Hetta heitið hava tær fult uppiborið, tí samanumtikið hava tær havt besta liðið í landskappingini í ár. At tær so eisini vunnu steypakappingina prógvar bara, at einki av hinum liðunum kom so mikið nær, at tað kundi hótta leiklutin hjá TB sum einaráðandi í føroyskum kvinnuflogbólti í løtuni.

Hjartaliga tillukku til TB við FM-heitinum og við greipuni ...


*TB fekk eisini ein sigur í seinasta dystinum, tá tær uttan stórvegis hóvasták vunnu trygt á ÍF*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

# Suðuroyggin heiðraði TB

**Høllin í Trongisvági var nær um fullsett, tá besta kvinnulið hjá TB í flogbólti leikti sín seinasta heimadyst. Aftaná sigurin fingu tvørákvinnur steypið og heiðursmerkini og nógvar lógvabrestir frá teimum út við 400 áskoðarunum**

FØROYAMEISTARA-VEITSLA
*Sveinur Tróndarson*

Tað var ball á Tvøroyri sunnudagin. Fyri fyrstu ferð í Gud vitið hvussu nógv ár, hevur TB vunnið eitt meistaraheitið, og tað skuldi markerast sum tað sømir seg elsta felagnum í landinum. At tað samstundis er fyrstu ferð, at flogbóltskvinnurnar hjá TB vinna eitt meistaraheitið í eldru deildunum ger bara gleðina á Tvøroyri uppaftur størri.

Tað byrjaði longu á middegi sunnudagin. Tá bjóðaði TB leikarum – bæði úr TB og ÍF-dómarum, umboðum fyri FBF, ÍSF og TB til morgunmatar í kantinuni í høllini í Trongisvági. Her fingu øll høvi til at fáa sær ein góðan bita og at tosa um kappingarárið, sum nú er farið aftur um, áðrenn farið var undir allarseinasta dystin hjá TB í hesum kappingarárinum.

Eftir dystin, sum TB jú vann ruddiliga við trimum settum móti ongum, bjóðaði TB øllum áskoðarunum, sum vóru einir 400 í tali, til landgangsbreyð og øl og sodavatn frá Restorff Bryggjarí.

– Har var øgiliga nógv fólk. Vit hava havt sera stóra undirtøku í ár og hon er bara økt síðani vit vunnu steypakappingina, sigur Virgar Djurhuus, venjari, sum sigur, at TB seldi 220 atgongumerkir til dystin sunnudagin. Aftur hesum koma so børnini, sum ikki rinda atgongugjald, og hann heldur, at samlaða talið av áskoðarum sunnudagin mundi liggja ímillum fýra og fimm hundrað.

Sum vera man vórðu nógvar røður hildar meðan breyðbitarnir, ølirnar og sodavatnirnar gliðu niðurum. Formaðurin í Flogbóltssambandi Føroya, Niclas Joensen, handaði gullvinnarunum FM-steypið og heiðursmerkir, sum tekin um, at tær hava vunnið landskappingina í ár, og tá rómurin hevði lagt seg, søgdu bæði formaðurin í TB og »the grand old man« í ítróttarlívinum á Tvøroyri, nøkur orð um týdningin av tí bragdið, sum TB-leikararnir hava framt í ár.

Tá henda hugnaliga løta var liðug, og alt var ruddað av aftur, bjóðaði Tvøroyrar Býráð leikarum og venjarum til ein døgverabita í høllini í Trongisvági. Matarlepin segði, at leikararnir fingu oksakjøt við tí sum her tilhoyrir, ís, vín og konjakk.

Vit frætta av Tvøroyri at sigursveitslan á Tvøroyri helt á til einaferð í nátt.

# TB er aftur komið á rætta rók

**Sofus Laðanberg, formaður í TB, og Sverri Midjord, næstformaður í ÍSF, fegnaðust í røðum sínum um, at TB nú aftur er á ovastu rók í føroyskum ítróttarhøpi**

FEGNIR TVØRAMENN
*Sveinur Tróndarson*

Tvørámenn ganga við brattari bringu í hesum døgum. Fyri fyrstu ferð síðani TB vann Føroyameistaraheitið í fótbólti í 1987, hevur felagið vunnið eitt steyp í bestu deildini í eini ítróttargrein, og tað eru tey errin um í býnum, sum hevur so stoltar traditiónir í ítróttarhøpi.

At gullið skuldi enda á Tvøroyri í ár, kundi ikki verið betri valt, tí júst í ár eru liðin 110 ár síðani TB varð stovnað og samstundis eru liðin 20 ár síðani høllin í Trongisvági varð tikin í nýtslu.

Júst hetta nevndi næstformaðurin í ÍSF, Sverri Midjord, sum samstundis helst er kendasti ítróttarmaður Tvøroyri nakrantíð hevur átt. Hann segði, at tað sum hendi var størsta ítróttarhending síðani høllin var tikin í nýtslu.

– Tað er ein góð markering av, at tað eru 20 ár síðani høllin alment varð tikin í brúk.

Sverri vísti eisini á týdningin sum meistaraheitið – og greipan – hevur fyri býin. Allur býurin fegnast um at tey eiga so virknan ungdóm og at tey stuðla ungdóminum í tí hann ger.

– Hesin stuðul ger tað møguligt at røkka teimum úrslitum tit hava rokkið í dag og tí takka vit teimum fyri.

Sverri nært eisini við, at tað í ár eru liðin 110 ár síðani TB varð stovnað. Í nógv harrans ár snúði tað seg bara um fótbólt, men seinnu árini er flogbólturin eisini lagdur afturat, og nú næstan á 110 ára føðingardegnum – hann er tann 13. mai – hátíðarheldur felagið, at kvinnurnar eru vornar meistarar.

– Tit hava við tykkara bragdið í dag sett TB, og harvið Tvøroyri, aftur á ovastu ítróttarligu rók, segði Sverri Midjord.

Sofus Laðanberg, formaður í TB, staðfesti, at tað hava verið nógvar glæsiligar løtur á Tvøroyri, men at løtan, tá TB sunnudagin gjørdist Føroyameistari í flogbólti, var ein av teimum stóru.

– Enn einaferð hava tit sett Tvøroyri í Fokus. At hesi úrslit eru fingin til vega kemur av áhuga og góðari leiðslu – øðrum feløgum til fyrimyndar. Sum formaður TB's er tað mær ein stórur heiður at heilsa tykkum. Gullið er tykkara, heiðurin er tykkara men æruna eigur Tvøroyri, segði ein errin Sofus Laðanberg, formaður í TB.

Og hann hevur sanniliga nakað at vera errin av. Seinasta árið hevur nevniliga verið nakað heilt serligt fyri TB. Eftir meira ella minni at hava ligið í dvala í nógv ár, vaknaði fótbóltsliðið við aftur móti endanum av kappingarárinum í fjør, og tá avtornaði hevði liðið vunnið aðru deild og harvið rætt til at leika í bestu deildini í ár.

Nú, bert hálvt ár seinni, stendur formaðurin aftur við pappíri í hondini og heldur røðu, tí TB hevur vunnið, og bara innan fyri tvær vikur, hava flogbóltskvinnurnar vunnið steypakapping og Føroyameistaraheitið. Jú, tey hava sanniliga nakað at fegnast um á Tvøroyri ...



Mjølnir — TB 1-3 (24-26, 20-25, 25-15, 22-25)

# TB vann á Mjølnir


*- Eg haldi, at vit hava slept hesum kappingarárinum fyri well. Hetta árið fer í gloymibókina og vit brúka ikki meira tíð upp á tað, sigur veteranurin hjá Mjølni, Marjun Kalsø*
*Mynd: SáH*

**Mjølnir megnaði ikki at taka stig frá meistarunum tá tær vitjaðu í Klaksvík leygardagin. Men tær fingu so eitt sett frá teimum kortini**

FLOGBÓLTUR - KVINNUR
*Sveinur Tróndarson*

Gullið var longu farið til Tvøroyrar og silvurið var longu farið til Klaksvíkar. Tí var í roynd og veru einki at spæla um í dystinum leygardagin, men spælast skuldi hann og spældu varð hann.

Og sjálvt um Mjølnir kvinnurnar høvdu sett sær fyri at geva TB mótstøðu fyri allar pengarnar, eydnaðist tað bara í fyrsta og triðja setti, og triðja setti vann Mjølnir.

Tað var ikki tí, at munurin á liðunum var tann øgiliga stóri. Marjun Kalsø, liðskipari hjá Mjølnir, sigur, at dysturin minti nógv um steypafinaluna. Liðini fylgdust nokk so stóran part av settunum, men at TB so fekk fótin fyri seg.

- Vit vóru ov lítið við í spælinum til veruliga at kunna geva teimum mótstøðu, sigur Marjun tá hon tekur saman um dystin.

Vit spurdu hana um tað sást á spælinum, at gullið og silvurið var avgjørt, og tað heldur hon at tað gjørdi. Í veruleikanum hevði TB meira at spæla fyri enn Mjølnir av tí at tær júst vorðu vornar meistarar, og tað var kanska orsøkin til, at Mjølnir segði gott er, heldur enn at berjast um bóltarnar.

- Eg haldi, at vit hava slept hesum kappingarárinum fyri well. Hetta árið fer í gloymibókina og vit brúka ikki meira tíð upp á tað, sigur Marjun, sum ikki veit at siga okkum, hvussu tað fer at síggja út hjá teimum næsta kappingarár.

Hon vísir á, at hon sjálv ikki er nakar ársungi longur, og at spurningurin er, hvussu tað verður við Veru Larsen og Tinu Jacobsen næsta kappingarár. Margit Joensen kemur hinvegin aftur eftir barnsburð, men enn er nógv eftir at fáa upp á pláss.

Tað er tað eisini á Tvøroyri, men har vita tey í øllum førum, at Gudrið Nolsøe kemur aftur, og tey vita eisini, at onkur annar er sum fer. Hvussu tað verður við restini fáa vit at vita tá fyrireikingarnar til kappingarárið byrja í heyst.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 16 | 15 - 1 | 46 | 11 | 35 | 23 |
| 2 | Mjølnir | 15 | 10 - 5 | 35 | 22 | 13 | 15 |
| 3 | ÍF | 15 | 5 - 10 | 23 | 36 | -13 | 7 |
| 4 | Dráttur | 15 | 5 - 10 | 27 | 34 | -7 | 6 |
| 5 | Fleyr | 15 | 3 - 12 | 13 | 41 | -28 | 5 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 15 | 10 - 5 | 36 | 25 | 11 | 15 |
| 2 | SÍ | 16 | 10 - 6 | 38 | 24 | 14 | 14 |
| 3 | Fram | 15 | 10 - 5 | 36 | 25 | 11 | 14 |
| 4 | ÍF | 15 | 5 - 10 | 22 | 37 | -15 | 10 |
| 5 | Mjølnir | 15 | 3 - 12 | 18 | 39 | -21 | 3 |

